# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Seinasta hondbóltsumfarið

**Í morgin verður seinasta umfarið í landskappingunum í hondbólti, og so eru bara sjálvar finalurnar í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini eftir. Í seinasta lagi 13. apríl vita vit so, hvørji lið eru føroyameistarar í hondbólti**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Tað einasta, sum eftir er at finna útav undan seinasta landskappingarumfarinum í hondbólti, er um tað verður Neistin ella VB, sum fær bronsuna hjá kvinnunum*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Longu undan seinastu dystunum er greitt, hvørji lið møtast í FM-finalunum, so tí er talan um seks landskappingardystir, sum bara skulu spælast, tí eingin teirra flytir nakað avgerandi. Einasti spenningurin er í grundini, um VB ella Neistin skal fáa bronsuna hjá kvinnunum, tí har er bara eitt stig millum liðini undan seinastu dystunum.

VB spælir á útivølli ímóti StÍF í høllini á Skála klokkan 13.30,og Neistin hevur klokkan 14.30 heimavøll ímóti Tjaldri í høllini á Hálsi í Havn. Triði dysturin er í KÍ-høllini klokkan 15, har Stjørnan tekur ímóti Kyndli, sum næsta kappingarár verður skift út við VÍF í Sunset-kappingini.

Í Atlantic Airways-kappingini hjá monnunum er alt longu avgjørt, og einki lið flytir seg á stigatalvuni, óansæð hvussu hesir seinastu tríggir dystirnir enda. Í høllini á Skála spæla StÍF og H71 klokkan 15, og hinir báðir dystirnir byrja klokkan 16. VÍF og Kyndil spæla í Vestmanna og Neistin og KÍF spæla í Havn..

### Finaludagarnir

Teir avgerandi dystirnir, ið nú eru eftir, eru so FM-finaludystirnir. Hjá kvinnum møtast Stjørnan og Tjaldur í finalunum, og hjá monnunum eru finaluliðini VÍF og H71. Hondbóltssambandið hevur nú ásett, hvussu FM-finalurnar verða spældar, og í seinasta lagi 13. apríl er greitt, hvørji lið eru føroyameistarar í hondbólti.

Fyrsta uppgerðin millum Stjørnuna og Tjaldur verður í Runavík tann 8. apríl, og tríggjar dagar seinni, tann 11. apríl, møtast liðini í Klaksvík. Stendur tá á jøvnum, er sjálvandi neyðugt við einari triðju finalu, og hon verður so í Klaksvík tann 13. apríl.

Hjá monnunum er fyrsti finaludysturin millum VÍF og H71 í Vestmanna tann 9. apríl, og síðani møtast liðini aftur í Hoyvík tann 11. apríl. Verður her neyðugt við einum triðja dysti, verður hann í Vestmanna tann 13. apríl.

Mannagongdin er annars tann, at í fyrsta lagi verða tvær finalur spældar. Stendur á jøvnum í stigum millum liðini, verður eisini ein triðja finala spæld. Endar onnur av teimum báðum fyrru finalunum við javnleiki, verður ein triðja finala ikki spæld.

## Vilt de Suðuroy av bakkastokki

**Í dag klokkan 17 fer eitt øðrvísi rennitiltak av bakkastokki í Suðuroynni. Umleið 60 rennarar hava teknað seg, men enn ber til at verða við til ymsu teinarnar**

RENNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Rennitiltakið Vilt de Suðuroy er renning úr Sumba til Sandvíkar, sum tó ikki er í einum, tí hugni, matur og gisting er partur av tiltakinum, ið er frá 3. apríl til 5. apríl. Eisini verður ein heilsugudstænasta í Hvalba sunnudagin.

Fýra teinar eru á skránni og eru teir tilsamans 45 kilometrar. Teinarnir eru 12 kilometrar úr Sumba til Vágs, níggju úr Vági til Hovs, aftur níggju úr Hovi til Trongisvágs og so at enda 15 kilometrar úr Trongisvági til Sandvíkar.

Tað eru yvir 60 rennarar, ið hava teknað seg til hetta vikuskiftistiltakið, men enn ber til at tekna seg, ella at møta upp ein hálvan tíma, áðrenn farið verður undir ymsu teinarnar. Til ber nevniliga at tekna seg til einstøku teinarnar á leiðini.

Tað er fyritøkan Vilt, ið stendur á odda fyri tiltakinum, nú boðað er frá, at 2009 er rørsluár, og meira fæst at vita um kappingina á heimasíðuni www.vilt.fo. Til ber at renna og at ganga teinarnar, og bussur fylgir við, um onkur legst fyri.

Fyrireikararnir siga, at talið á rennarum er størri enn mett, og hetta fegnast teir um. Eisini gleðast teir um, at starvsfólkið á Strandferðsluni, ið hevur tikið rørsluárið í álvara, hevur teknað seg til Vilt de Suðuroy.

# Vodafonedeildin byrjar í kvøld

**Víkingur og ÍF spæla í kvøld ársins fyrsta dyst í Vodafonedeildini, og so eru tveir dystir í morgin og tveir sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

So byrjar landskappingin í fótbólti, og hon heldur á við sínum 27 umførum, til vit leygardagin 3. oktober vita, hvør er føroyameistari og hvussu hini enda á stigatalvuni. Onkur fær silvur og bronsu og onkur má siga bestu deildini farvæl, tá komið er so langt.



*Fyrstu steypadystirnir eru spældir fyri fáum døgum síðani, men nú byrjar so landskappingin í fótbólti*

Fyrsti Vodafonedysturin í ár verður spældur í kvøld klokkan 18 í Sarpugerði, har grannauppgerð er millum Víking og ÍF. Síðani eru tveir dystir í morgin, tá HB og B68 spæla í Gundadali klokkan 15, og NSÍ og KÍ møtast við Løkin í Runavík klokkan 17.

Sunnudagin eru so teir báðir síðstu dystirnir í fyrsta landskappingarumfarinum, tá greipuvinnararnir í EB/Streymi við Margáir taka ímóti uppflytarunum úr 07 Vestur, og B36 í Gundadali spælir ímóti AB, sum aftur hevur vunnið seg upp í bestu deildina.

## Fótbóltsprísurin fer upp

**Hámarkið fyri prísirnar á atgongumerkjum til dystirnar í bestu fótbóltsdeildini hjá monnum hækkar nú upp í 80 krónur**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í kvøld byrjar Vodafonedeildin í fótbólti, og tey, sum fara til fótbólt, koma nú at gjalda 80 krónur fyri dystirnar. Hetta eru 10 krónur meira enn í fjør.

Starvsnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur eftir ynski frá feløgunum tikið avgerð um at hækka hámarksgjaldið fyri dystir í Vodafonedeildini úr 70 krónum upp í 80 krónur.

Annars eru tað feløgini sjálv, ið áseta prísirnar fyri atgongumerki til dystirnar, men vanligt hevur verið, at tey hava brúkt hámarksprísin, sum FSF ásetur.

# Mistak hjá Neistanum

Í gjár skrivaði Sosialurin um dystin millum Neistan og VÍF, sum mikudagin varð endaliga spældur eftir langa tíð við skriviborðsstríðið.

Á dómaraseðlinum, tá dysturin var liðugur, stóð, at Neistin gjørdi vart við, at Áki G. Olsen var leikbannaður. Málið er greitt frá í blaðnum í gjár, men tá eydnaðist ikki at fáa orð á Inga Olsen, venjara hjá Neistanum.

- Vit gjørdu eitt mistak, og onki verður gjørt víðari í málinum, sigur Ingi Olsen.

Við hesum, kann endaliga staðfestast, at dysturin millum Neistan og VÍF, sum hevur verið leiktur hvønn dag síðan 18. januar, er endaliga avgreiddur.




VÍF vann málríka dystin við 36 málum ímóti teimum 34 hjá Neistanum.